# SPARA NÓGV



## 1100 KRÓNUR

*Baldvin Harðarson í ferð við at avmynda hitaleikarnar í einum sethúsum. "Fyri tað um grannin rindar 1100 krónur ella meiri í olju um mánaðin, so nýtist tú ikki at gjalda tað", sigur hann við kundan. Ein kanning av hitastøðuni kann vera fyrsta stigið í hesi sparing*

## Pen hús, men ...

**Fyri meiri enn 10 árum síðani fekk maðurin ein timburmann at smíða sniðhús síni.**

**Hann og konan eru sera væl nøgd við húsini, men halda seg kortini hava goldið í so mikið í olju. Nú skal altso broyting koma í.**

**– Tað er ofta so, at ein skundar sær ov nógv við at fáa húsini bygd. Húsini kunnu tí saktans síggja bæði pen og góð út, men ein sær altso ikki alt: Timburarbeiðið kann vera illa gjørt, ella kanska er bjálvingin ikki nøktandi. Er talan beinleiðis um byggisjusk, er tað jú næstan ógjørligt at koma aftur umaftur fyri at umvæla.**

**– Hetta kundi verið fyribyrgt við at kanningar verða gjørdar av húsum undir bygging, bæði fyri at verja eigaran og byggiharran. Soleiðis kundu báðir partar spart nógvan pening í framtíðini, sigur Baldvin Harðarson.**